# handVERKARIN

2012 BLAÐ NR. 42 HAVNAR HANDVERKARAFELAG



# HVØR AVGERÐ NÆR FRÍTÍÐIN



*Marita í Brekkunum, skrivstovukvinna hjá Havnar Handverkarafelag*

Sambært frítíðarlógini er tað arbeiðsgevarin, sum í samráð við løntakaran ásetur, nær frítíðin skal haldast.

Tó er ásett í lógini, at minst 24 dagar, t.e. 4 vikur, av frítíðini skulu gevast samanhangandi í tíðarskeiðinum 2. mai-30. september.

Rættur arbeiðsgevarans at taka endaliga støðu til, nær summarfrítíðin skal takast, merkir eisini, at um arbeiðsplássið steingir ávísa tíð, hevur løntakarin skyldu til at taka summarfrítíðina hetta tíðarskeiðið, alt undir tí fyritreyt, at 24 daga t.e. 4 viku reglan, sum nevnd frammanfyri, verður hildin.

## Rættur til summarfrí

Frítíðarárið verður roknað frá 1. apr. -31. mars.

**Í blaðnum hesa ferð:** **síða**


Glasmynd. . . . . . . . . . forsíðumynd
Hvør avgerð nær frítíðin skal haldast. . . . . . . . . . s. 2
Glarmeistarin Poul Guttesen . . . . . . . . . . s. 4
Stásilig hølir til ymisk endamál . . . . . . . . . . s.12
Semja við Fíggjarmálaráðið . . . . . . . . . . s. 15
Sjónarhornið: Ragnar Guttesen . . . . . . . . . . s. 16
Tíðindi frá Landsfelagnum . . . . . . . . . . s. 18
1. mai dags røða hjá Eli Brimsvík . . . . . . . . . . s. 22



**Útgevari:** Havnar Handverkarafelag · Stoffalág 60 · Box 203 · 110 Tórshavn
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Eli Brimsvík
**Blaðstjórn:** Media · **Umbróting, prent og liðugtgerð:** Føroyaprent
Havnar Handverkarafelag gevur Handverkaran út 4 ferðir um árið.
**Skrivstovutíð:** Mánadag til og við hósdag frá kl. 9 til 15.
Telefon 35 48 00 · fax: 35 48 01 · Teldupostur: handverk@handverk.fo · www.handverk.fo

# SKAL HALDAST

Sjálvt um limur ikki hevur uppvunnið sær rætt til frítíð við løn, hevur limur tó altíð rætt til 5 vikur summarfrí – hin spurningurin er so, hvussu nógva løn ein hevur rætt til í summarfrítíðini.

## Uppvunnið

Uppvunnir verða 2,5 dagar frítíð við løn fyri hvønn mánað ein hevur arbeitt. T.v.s. at er ein limur t.d. komin í starv 1. jan. 2012, hevur viðkomandi rætt til løn í 7,5 dagar, t.e. 2,5 dagar fyri januar + februar + mars, eftirsum frítíðarárið skiftir 31. mars.

Sambært frítíðarlógini er frítíðin 30 dagar – t.v.s. 6 dagar x 5 vikur.

Frítíðin verður smb. Frítíðarlógina roknað frá mánadag til og við leygardag.

Hvat hendir, um løntakarin gerst sjúkur, áðrenn hann skal byrja summarfrítíð sína.

Um løntakari gerst sjúkur og boðar arbeiðsgevaranum frá hesum, áðrenn summarfrítíðin skal haldast, so verður summarfrítíðin útsett, so leingi viðkomandi er sjúkrameldaður.

Um talan er um arbeiðspláss, sum steingir í summarfrítíðini, og løntakari gerst sjúkur, áðrenn summarfrítíðin skal byrja og sjúkrameldaður, so byrjar summarfrítíðin hjá viðkomandi ikki, fyrr enn viðkomandi er frískur aftur.

## Hvat hendir, um løntakari gerst sjúkur í summarfrítíðini

Um løntakari gerst sjúkur summarfrítíðini, hevur ein ikki rætt til eyka summarfrítíð.

Undir serligum umstøðum kann løntakarin søkja um at fáa frítíðina góðgjørda frá arbeiðsgevaranum.

## Hvussu er rættarstøðan, tá løntakari verður sagdur úr starvi:

Í Frítíðarlógini § 8 er ásett, at um løntakari verður uppsagdur, so má uppsparda frítíðin ikki leggjast inn í uppsagnartíðina. Tað merkir, at uppsagnarfreistin skal leingjast samsvarandi.

Málarameistari
RANSIN N. DJURHUUS
TEL. 26 46 82

# GLARMEISTARIN POUL GUTTESEN



Poul Guttesen hevur arbeitt sum glarmeistari í meira enn 31 ár. Við so drúgvum royndum hevur tað verið møguligt at spesialisera seg í øllum, sum hevur við glas og rútar at gera. Okkara arbeiði fevnir víða; frá arbeiði við ovurstórum framsýningarrútum til smá spegl, sigur Poul Guttesen, sum er stjóri í fyritøkuni Glarmeistarin.

## Okkara endamál

Okkara endamál er at veita eina trygga tænastu til føroyska marknaðin. Alt arbeiðið, sum vit gera, verður gjørt eftir røttum forskriftum. Tá vit seta rútar í, veita vit samstundis 10 ára trygd fyri punktering. Poul Guttesen greiðir frá, at hann hevur arbeitt í glasyrkinum í meira enn 31 ár. Tá man hevur so drúgvar royndir í glasyrkinum kann kundin altíð kenna seg tryggan við okkara arbeiðið. Tað vil siga, at, tá ið vit hava gjørt okkara arbeiði, er ikki neyðugt at koma afturumaftur. Royndir okkara fevna um alt glarmeistaraarbeiðið, stórt sum smátt.

## Nógvir feilir

Termorútar verða monteraðir runt um í landinum av ymiskum handverkarum og øðrum, sum átaka sær slíkt arbeiði. Vit kunnu við vissu siga, at nógva staðni verða feilir gjørdir, sum skaða livitíðina hjá termorútunum og á rammunum, sum teir verða monteraðir í. Ofta verða lærlingar, og fólk við lítlum ella ongum royndum, sett til at seta rútar í. Tí verða eisini nógv mistøk gjørd. Tað er tá vit seta nýggjar rútar í, at vit síggja hesir feilir. Tað sama er galdandi fyri glaslistar og pakningar, og hvussu rútarnir eru klossaðir upp. Vit skifta altíð pakningar út og brúka Wurth-skrúvur til at festa glaslistarnar við. Vit kunnu siga, at eitt bíligt tilboð er ikki altíð eitt gott tilboð. Frá fyrsta degi hava vit lagt okkum eftir at gera væl úr hondum greitt arbeiði. Arbeiðið við glasi dekkar breitt, alt frá framleiðslu og montering av termorútum, glas til brúsukabinir, glas til altanir, spegl, einkult glas o.s.fr.

## Hert glas

Her eigur eisini at vera nevnt, at vit selja hert glas, sum er 5-7 ferðir sterkari enn vanligt glas. Eisini selja vit ráglas, sum ikki sæst ígjøgnum; tað verður nýtt til hurðar, wc og baðirúm, og eisini laminerað glas. Glas fæst í nógvum ymiskum útgávum, tað er bara hugflogið, sum setur markið fyri design og litir. Innandura verður glas nýtt til t.d. innrætting av privatum heimum, hotelrúmum og matstovum. Í hesum sambandi hava vit nógvar ymiskar kreativar loysnir.

## Spara orku

Í hesum døgum eru fólk tilvitað um at nýta rútar, sum spara orku. Við at skifta teir einkultu ella gomlu termorútarnir út við lágorkurútar, sæst tað veruliga aftur á oljurokningini. Nýggj byggireglugerð er nú galdandi, og hon setur strangari krøv til bjálving. Tað er ikki altíð neyðugt at skifta vindeyguni út fyri at fáa betri bjálving; at skifta rútarnar er ofta nokk. Eru vindeyguni nøkulunda í ordan, er ikki neyðugt at skifta tey.

## Lágorkurútar

Vít nýta tað lágorkuglasið sum eitur S3. Tann optimala bjálvingin fyri ein lágorkurút við 2 løgum, 15 – 18 mm ímillum gløsunum er 1,1 W/m²K. Við argon gassi í. Tynri rútar sum hava Argon gass í, bjálva minni , tynri teir

verða. Heilt tunnir rútar bjálva betri við Xenon ella Krypton gassi í, men gerast nógv dýrari. Hevur mann trupulleika av døggi eftur kantinum av rútunum, kann tað verða ein loysn at fáa sær nýggjar rútar við einum sokallaðum Varm kants profili. Hann brýtur kuldabrúnna av betur enn vanligu avstandsprofilarnir.

Skalt tú bjálva ímóti ljóði, so er lættasti mátin at gera ein termorút við t.d. 4 mm glas innan, og so 6 mm glas ella meir, uttan. Tað bjálvar betri enn ein 3 lags rútur, sum hevur 4mm glas og sama avstand ímillum gløsini. So kann mann gera rútar við serglasi til ljóðbjálving. Tað er so ein dýrari, men betri loysn.

## Spara nógvan pening

Ein termorútur sum hevur 9 mm avstandsprofil og s3 glas innvendiga og er fyltur við argon gassi, hevur eitt u-virði uppá uml. 1.5-1.6 W/m²K.

Ein termorútur sum hevur 12mm avstandsprofil og s3 glas innvendiga og er fyltur við argon gassi, hevur eitt u-virði uppá uml.1,3W/m²K.

Ein termorútur sum hevur 15mm avstandsprofil og s3 glas innan og er fyltur við argon gassi , hevur eitt u-virði uppá uml.1,1 W/m²K. Lágorkurútar við sokallaðum „heitum kanti“ bjálva ikki betur (argon gass/16mm






Framhald á s. 8

avstandsprofil = 1,1W/m²K og ikki 1,0 sum onkur leverandørur vil verða við, men kuldabrúgvin framvið avstands-profilinum verður minkað.

Nú kann man fáa rútar, ið bjálva heilt niður í 0,4-0,5 W/m²K. Dømi 3lags rútur 4(s3)*12*4*12*4(s3) fyltur við krypton gassi, í alt 36mm tjúkkur. Minsta tjúgd er 24mm fyri ein 3lags rút við 4 mm glasi, lágorkuglas innast og uttast. u-virði 0,8W/m²K. Hesin rúturin er sjálvsagt væl dýrari .

Rútakostnaðurin er tjentur innaftur innan nøkur ár, samstundis sum tú ert við til at minka um co2 útlátið.

Termorútarnir, ið vit nýta, eru framleiddir hjá Pilkington DK. Víð at skifta teir einkultu ella gomlu termo-rútarnar út til lágorkutermorútar kanst tú spara nógvan pening uppá olju-rokningina.



Glasarbeiði í skúlanum á Løgmannabreyt

## Fyritøkan

Vit hava sjálvir bilar og spesialamboð til glasarbeiði og leiga annars arbeiðs-amboð, tá tørvur er á tí. Til dømis tá rútar skulu skiftast í høgum bygningum; tá leiga vit kranabilar ella lyftur -alt eftir, hvør tørvurin er. Tað, sum er mest umráðandi er, at arbeiðið verður gjørt so gott sum man nú kann gera tað og eftir øllum forskriftum, sum eru galdandi. At kundin sjálvur ger arbeiði ella letur onkran, sum hevur átikið sær at gera arbeiði, sum hann ikki veit nokk um, kann koma at kosta eykað í síðsta enda. Allar royndir vísa, at best er at lata tann serkøna gera arbeiði.

## Pilkington

Poul greiðir okkum frá, at teir selja termorútar, sum eru framleiddir hjá Pilkington í Danmark. Pilkington er ein kend ensk glasverksmiðja, sum varð stovnað í 1826 og er í dag løgd saman við stóru japansku glasfyritøkuni NSG



(Nippon Sheet Glass Co). Samtakið eitur í dag Pilkington NSG Group, ið er ein av heimsins størstu glasfyritøkum, sum eisini hevur glasframleiðslu í Norðurlondum. Rútarnir eru sera væl egnaðir til okkara veðurlag.

## Skjóta og góða tænastu

Um tænastuna hjá Glarmeistaranum er vert at nevna, at um ein rútur brotnar so er altíð møguligt at ringja til Glarmeistaran, telefon 21 94 66 ella 22 94 66. Glarmeistarin er altíð førur fyri at loysa einhvønn trupulleika. Um ein rútur ikki er á goymslu, finna vit eina fyribilsloysn, til rætti rúturin verður ísettur, greiðir Poul frá. Vit geva 10 ára garanti ímóti punktering upp á rútar, sum vit levera og sjálvir montera. Hjá okkum hevur eitt væl gjørt arbeiði alt at siga. Vit geva fegnir eitt

# GLARMEISTARIN POUL GUTTESEN

óbindandi tilboð upp á alt í glasi bæði innan- og uttandura.

## 31 ára royndir sum glarmeistari

Poul Guttesen greiðir frá, at hann sum ungur lærdi til snikkara í Finnlandi.

Tá hann var útlærdur – 21 ára gamal -flutti hann aftur til Føroya at búgva. Um hetta mundi søkti Termuvirkið í Havn eftir einum manni til glasarbeiði. Eg søkti og fekk starv hjá teimum. Og mær dámdi so mikið væl at arbeiða við glasi, at eg vildi læra til glarmeistara, men tað bleiv so ikki fyrrenn í 2001. Tá hevði eg arbeitt í umleið 20 ár hjá Termovirkinum. Eg geri altíð mínar uppgávur til fulnar og kann ikki lata nakað fara hálvliðugt úr mínum hondum.

## Ragnar Guttesen

Poul hevur ein góðan makkara, sum eitur Ragnar Guttesen. Hann er útbúgvin bygningssnikkari, men hevur um 16 ára royndir í glarmeistarayrkinum. Hann er sera dugnaligur, álítandi og nærlagdur, og við sínum royndum er hann ein av bestu monnum til hetta arbeiðið. Hjá okkum er tað er altíð umráðandi at gera gott arbeiði. Tað nyttar onki at skunda sær og sjuska alt ígjøgnum, og so koma at gera arbeiði umaftur.

## At gera glas

Tað stutta svarið er, at tað eru ávís ráevni, sum skulu til, og tey verða so hitað upp í einar 1500 gradir. Tá verður tilfarið flótandi og verður lagt út í eitt tinbað. Tá verður alt flót-



andi, og av tí at glas er lættari enn tin, so flýtur glasið omaná tininum; tá verður glasið snóra beint. Tað vanliga er at gera glas í langar banar -sum so seinni verður skorið sundur, tá íð glasið kølnar. Tjúgdina fær man við at tilføra meira rávøru og at seinka ferðina á framleiðsluna.



## Hert glas

Hert glas er nógv sterkari enn vanligt glas; tað tolir nógv størri trýst, og brotnar ikki so lætt, sum vanligt glas. Til dømis hevur 5 mm hert glas somu styrki sum vanligt 12 mm glas ella meir. Áðrenn glasið verður hert, skal tað skerast til rætt mát, útskerast og møgulig hol borast. Áðrenn herðingina verður glasið kantslípað. Við at slípa glasið verður tað sterkari í kantinum. Tilskorið glas hevur mikroskopiskar rivur í kantinum, sum man sleppur undan við at slípa glasið. Glasið verður hert við, at tað verður hita upp til uml. 650¬750gr/c, og aftaná verður tað sjokk avkølt við luft. Tá verða stórir mótspenningar í glasinum; tað er hetta sum styrkir glasið. Yvirfladan verður ikki herd -uml. 0,1mm niður í glasið, og ½ av tjúktini av glasinum inn frá kantinum. Hert glas „skøvast“ líka lætt sum vanligt glas, og møguligt er at slípa og polera kantarnar. Men man skal verða varin, tað má ikki slípast ov nógv av. Um slípað verður inn til har, sum glasið er hert, so er vandi fyri at glasið brotnar. Herða glas kann brotna av ongum. Hetta kemst av, at hert glas inniheldur mikroskopiskar forbrenningsleivdir, nikkulsulfid, frá smeltiprosessini.

Við at útseta glasið fyri eina sonevnda „heat soak process”, t.v.s. eina eykað upphiting finnur man slíkar feilir í glasinum. Hert glas er ikki líka vandamikið sum vanligt glas, men fær man brotið hert glas yvir seg, so kann støðan gerast hættislig. Herða glas sum er brotnað, hongur ofta saman í stórum flatum, sum kunnu gera skaða . Og at enda kunnu vit nevna, at hert glas verður bílagt eftir máti.

# Stásilig hølir til ymisk endamál





1. Hølini kunnu útleigast til limir, eins og onnur uttanfyri felagið; talan kann vera um feløg, stovnar ella einstaklingar.

2. Farast skal væl um hølini, og skulu tey latast aftur í sama standi, sum tá ið tey vóru útleigað.

Møguligir skaðar á innbúgv og útbúnað undir útleigan, skal alt fyri eitt fráboðast felagnum, og fult endurgjald fyri umvæling/nýkeyp skal rindast felagnum.

3. Hølini verða leiga út til hesi endamál:

A. Vanlig tiltøk og fundir eftir vanliga arbeiðstíð.
B. Tiltøk, ið eru í vanligari arbeiðstíð og eftir vanliga arbeiðstíð.
C. Tiltøk ið fevna um meira enn ein dag.
D. Framsýningar, eftir nærri avtalu.
E. Merkisdagar (t.d. føðingardag/fermingardag)
F. Skeiðvirksemi.

4. **Prísir.**
Er talan ikki um limir er kostnaðurin við køki pr. kvøld 2.000,- kr.
Limir leiga hølini til Merkisdagar (inkl. nýtslu av køki) fyri 1.000,- kr.
.
Er talan um onnur tiltøk, sum t.d. fevna um fleiri dagar, verður nærri prísur avtalaður.



Húsavarðartænastan 10 ár 2001 - 2011



# Ogna tær tín egna húsavørð

*- bæði virkir, stovnar og privat kunnu ogna sær ein húsavørð*

sansir.fo

Vit bjóða virkjum, stovnum og privatum kundum fasta avtalu um ein tímasettan húsavørð. Um ásetta tímatalið ikki verður brúkt ein mánaða, kunnu tímarnir flytast til komandi mánaða, so tað ber til at savna tímar saman.

Vit taka okkum av øllum hugsandi húsavarðar-uppgávum. Er nakað átrokandi, eru vit á staðnum beinanvegin.

Somuleiðis eru vit til taks alt samdøgrið, tá ið bráðneyðugt arbeiði skal gerast.

*Vit átaka okkum eisini alt arbeiði í samband við bygging og umbygging av: skúlum, sethúsum, raðhúsum, barnagørðum, íbúðarhúsum.*

*Harafturat alla gólválegging: trægólv, teppi, linoleum og vinyl - eisini til vát- og baðirúm.*

---

## Reinsa við turr-ísi



NÝTT

Reinsar blámusopp, maskinur, el-lutir og kann eisini nýtast til sandblásing.
Brúkar ikki vætu. Ring og hoyr nærri.

## Betong-saging




NÝTT

Við okkara nýggju Diamant-ketusag kunnu vit skera tjúkdir upp í 57 cm.
Ring og hoyr nærri.

---

**Húsavarðartænastan Spf**
Brattalíð 8 | Tórshavn
hvt@olivant.fo | Tel. 29 00 29

**Húsavarðartænastan**

Ídnaðar- og garaguhurðar
Spyr fyrst hjá okkum: tlf. 31 99 92

Sp/f. Tórshavnar Maskinverkstaður
Vestara bryggja - Box 3135 - FO 110 Tórshavn

rør-tænastan
v/EYÐFINN HANSEN TLF. 22 81 80
Vatn·Hiti·Sanitet·Ventilatión

Ein depil innan skipatænastur

www.mest.fo

At smíðja, umvæla og umbyggja skip og verksmiðjur er okkara avbjóðing.

Men **MEST** er eisini so nógv annað.

**Vit bjóða m.a.**

- Serkøn fólk og vælútgjørdar smiðjur
- Landsins størstu goymslu av eykalutum
- Projekt- og teknistovuarbeiði
- Stórar bedingar og turrdokk
- Leigu av sleipibátum og kranum
- Titringsmátingar (vibratiónsanalysur)



MEST

**MEST**
P.O. Box 65
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands

Tel +298 30 11 00
Fax +298 30 11 01
info@mest.fo
www.mest.fo

# SEMJA VIÐ FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ UM 2011 OG 2012



24. apríl 2012 gjørdi Landsfelag Handverkaranna semju við Fíggjarmálaráðið; høvuðsbroytingarnar vóru hesar:

## 1. Sáttmálaskeið

Sáttmálin verður endurnýggjaður fyri tíðina frá 1. oktober í 2011 til 1. oktober í 2013.

## 2. Lønarhækkanir

Tann 1. oktober í 2011 hækka allar mánaðarlønir 220 kr., og tann 1. oktober í 2012 hækka tær aftur 220 kr.

## 3. Aðrar broytingar

Inn verður sett nýggj grein:

§ 7 a. Vaktarskylda

Tá ið handverkari verður settur í starv ella er í starvi, sum fevnir um ávísa vaktarskyldu ella ávísa telefonvakt, skal avtala verða gjørd um, hvørja samsýning, handverkarin skal hava. Samsýningin kann vera veitt sum løn ella sum avspákan. Tá ið mett verður um samsýningina, verður tikið við alt tað, sum hevur týdning, so sum, hvat verður kravt av handverkaranum, hvussu ofta nakað kemur fyri, og tradisjónirnar í fakinum. Slíkar avtalur verða at senda Lønardeildini í Fíggjarmálaráðnum til góðkenningar. Henda áseting kemur í gildi frá 24. apríl 2012 at rokna.

Í grein 3 verður sett inn nýtt stk. 5, ið er soljóðandi: Handverkari, sum er leiðari hjá øðrum handverkarum, verður løntur við einari løn, sum svarar til 6 eyka stig í lønartalvuni, sí hesa.

## 4. Ígildiskoma

§ 23 verður soljóðandi: Hesin sáttmáli er galdandi frá 1. oktober í 2011, og báðir partar kunnu siga hann upp við 3 mánaða freist, tó í fyrsta lagi til 1. oktober í 2013.

## 5. Dagføring

Lønartalvan er dagførd eftir omanfyristandandi.

*Á Argjum tann 24. apríl í 2012*

Føroya Handverkarafelag
Landsfelag Handverkaranna
Fíggjarmálaráðið

# SJÓNARHORNIÐ: RAGNAR



**Núverandi starv:**
Arbeiði sum glarmeistari hjá Glarmeistaranum Poul Guttesen

**Aldur:**
40 ár

**Maki:**
Brynhild U.K. Guttesen

**Børn:**
David 12 ár. Kristina 7 ár.

**Handverksútbúgving:**
Bygningssnikkari. Byrjaði at læra í august 1998

**Tekniskur skúli:**
Århus Tekniske Skole og Vejle Tekniske Skole. Fyrsta skeiðið var 20 vikur. So vóru 7 skeið, sum vóru 5 vikur hvørt.

**Útlærdur:**
22. August 2002.

**Sveinastykkið:**
Skuldi gera eitt veggjaskáp úr Mahogni (finer+kantlistar) og eina úthurð við 6 fyllingum.

**Arbeitt sum sveinur hjá:**
SA Vinduer og Døre í Århus. BSV í Tórshavn og s/pf FARCON og arbeiði nú hjá "Glarmeistarin Poul Guttesen".

# GUTTESEN



*Ragnar Guttesen*

**Er tað okkurt serstakt arbeiði, sum tú minnist væl:**
Brannhurða partí, Skejby Sjúkrahús Århus. Og vindeygu og hurðar til Tietgen Kollegiet KBH.

**Hvussu eitur besti handverkarin, sum tú veit um:**
Poul Guttesen. Havi ikki vita betri.

**Frítíðarítriv:**
Havi hús, konu og børn. Og so sjálvandi fótbólt.

**Besta bók:**
Havi ikki lisið hana enn. :-)

**Besti sangur:**
Hava nógvar. TOTO. Regin bróður eisini. Michael Jackson. Ringt at siga.

**Besti filmur:**
Schindlers List vm.

**Besti sjónleikari:**
Liam Nieson, Jack Nicholsen og Morgan Freeman.

**Hvør heldur tú hevur myndað tín persón mest:**
Foreldrini.

**Hevur tú ein ella fleiri søguligar persónar, sum hugtaka teg:**
Kanska.

**Hvør er tín største fyrimynd:**
Babba. Gott handalag og dugdi at umvæla alt.

**Fartelefon:**
NOKIA.

**Telda:**
LG. TOSHIBA

**Bilur:**
Ford Escort.

**Hvat heldur tú um eftirlønarskipanina hjá Havnar Handverkarafelag?**
Super.

**Hvat heldur tú um samlagstryggingina hjá felagnum?**
Ikki so galið um man kemur lort í býin.

**Hvat heldur tú er største avbjóðingin hjá einum handverkara í dag:**
Arkitektar og konstruktørar uttan fakliga útbúgving.

**Hvat kann gleða teg í gerandisdegnum:**
Tá tað gongur gott hjá familju, vinum og B36.

**Hvat kann øsa teg:**
Negativ fólk, vánaligt handverk og dovinskapur.

# Landsfelag Handverkaranna hevði aðalfund 23. mai 2012 í hølunum hjá Havnar Handverkarafelag

Danial Pauli Djurhuus, formaður Landsfelagsins, greiddi m.a. soleiðis frá farna árinum.

Aftur hesaferð hava samráðingarnar við Fíggjarmálaráðið tikið langa tíð; 6 mánaðir.

Sáttmálin við FMR gekk út 1. Oktober 2011. Løgtingsval varð í fjør heyst, og ongar veruligar samráðingar vórðu fyrr enn eftir løgtingavalið, og nýggj samgonga varð skipað. Sum kunnugt fóru fýra fakfeløg til samráðingar við FMR, men striltið gekk, og tað endaði við, at tað eina felagið fór í verkfall. Ikki fyrr enn alt hettar var vorið avgreitt, kundu LFH og FHF fara til samráðingar við FMR.

## Undirskrivað 24. Apríl 2012

Semja um nýggjan 2-ára sáttmála við Fíggjarmálaráðið varð undirskrivað 24. Apríl 2012. Sáttmálin er fyri tíðarskeiðið frá 1. oktober 2011 til 1. oktober 2013. Tann 1. oktober 2011 hækkar lønin 220,00 kr. um mánaðin, og tann 1. Oktober 2012 hækkar mánaðarlønin við somu upphædd. Sostatt hækkar eftirlønargjaldið ikki, men einans lønin. Semjan inniber eisini nakrar broytingar í sáttmálanum, eitt nú viðvíkjandi vaktarskyldu og handverkarum í leiðandi starvi vm.

Eingin sáttmáli er enn gjørdur við Kommunala arbeiðsgevarafelag føroya (KAF). Næsti fundur verður væntandi seinast í mai mánaða. Palli Djurhuus umrøddi tey punktini, sum fyriliggja í sambandi við samráðingarnar. Í hesum førinum snýr tað seg um SEV-sáttmálan.

Ætlanin er at fáa ein sáttmála við KAF um handverkarar í starvi hjá kommununum. Ein útmelding frá KAF hesum viðvíkjandi fyriliggur ikki enn.

Annars verða samráðingar í heyst við Handverksmeistarnar.

## Almannaverkið

Palli Djurhuus kunnaði um, at fundur hevur verið við Almannaverkið, nú Almannastovan



*Danial Pauli Djurhuus, formaður Landsfelag Handverkaranna*

og Nærverkið eru løgd saman. Almannaverkið er nýggja navnið fyri samanlagda stovnin.

Talan var um ein kunnandi fund, har greitt var frá um nýggja stovnin, og hvørjar avbjóðingar liggja fyri framman. Samanleggingin fer at hava ávirkan á starvsfólkini, og tí vóru fakfeløgini boðin til fundar. Kunningin var gjøllig, og høvi var at seta spurningar, og at umrøða og kjakast um ymisk viðurskifti. Feløgini verða kallað inn til fundar aftur seinni.

## Marknagilsdepilin

Fundur hevur verið í Vinnuhúsinum, har handverkarafeløgini eisini luttóku. Projektið er ov ógreitt, og feløgini í Vinnuhúsinum (meistarafelagnum) vilja ikki bjóða upp á projektið. Landsverk, sum eisini luttók á fundinum, skal broyta útbjóðingartilfarið og nýggj freist skal ásetast. Hettar eisini fyri at føroysk og útlendsk feløg kunnu luttaka á jøvnum føti.

## Nevndarlimir í Landsfelag Handverkaranna eru nú:

**Fyri Vágs Handverkarafelag:**

Danjal Ludvig og Jacob Petur Joensen, varamaður er Uni Egilsnes.

**Fyri Skála Handverkarafelag:**

Suliverius Jacobsen og Johannus Bertelsen, varamaður er Eljesar Rasmusen.

**Fyri Havnar Handverkarafelag:**

Eli Brimsvík og Sofus Joensen, varamaður Jacobus Kamminga.

**Fyri Føroya Prentarafelag:**

Durið Eyðbjørnsdóttir og Hanna M. Michelsen. Varaumboð: Petra Eliasdóttir

# KETILIN

## ...NÝTIST AT SIGA MEIRA?

JÄSPI-ketilin er kendur í Føroyum. Við mest seldum ketlum á føroyska marknaðinum nýtist ikki at siga meira...

JÄSPI-ketilin fáa tygum hjá Mariu Poulsen.

Ring 312000 og fá eitt óbindandi tilboð!



JÄSPI

**Maria Poulsen**

Tel 312 000 | Fax 315 970 | mp@mp.fo | www.mp.fo

# Nýggjan køk?

- vit hjálpa tær at finna dreymakøkin














**NÝGGJUR SVARTUR EKSLUSIVUR OG ELEGANTUR KØKUR**

Nýggjasti mótin innan køkar í løtuni er svart og hvítt. Tiskil hevur Aubo framleitt nýggju lúkuna Melinga Svart, sum beinan vegin bleiv ein bestseljari. Melinga fylgir mótanum, køkurin er einkul, stílreinur og longu blonku handtøkini eru eitt grafiskt íkast til beinu linjurnar.

Vit hjálpa tær fegin við at tekna køkin, soleiðis at hann hóskar júst til tín. Tú skalt bara taka mát av rúminum. Til ber eisini at siggja fleiri køkar frá á www.2x3.fo.

TIMBUR HT TILFAR HANDILIN

Heykavegur 4 · 110 Tórshavn · Tel. 311250 · 2x3@2x3.fo · www.2x3.fo



# GOTT FUNDARFÓLK, GÓÐU ÁHOYRARAR

*Várt land hevur fostra eitt ravnaslag,*
*fegnast tað flýgur um nætur,*
*brátt vaknaði mangur til beiskan dag,*
*ið ikki gav eftir tí gætur.*

Soleiðis tekur skaldið Janus Djurhuus til í eini yrking, og visti eg ikki betur, hevði eg trú, at hettar var yrkt um tey, sum nú ráða fyri borgum her á landi.

Tað sær út sum, at man hevur sett sær fyri at niðurbróta alt, sum fungerar her í samfelagnum, og seta onnur ting í gongd, ið eru sera ivasom, fyri ikki at siga óbrúkilig.

Tak eitt nú flatskattin, pensiónsskattastuldurin,vina- og kenningapolitikkin, stuldur av fólksins ogn og eg kundi hildið á fram.

Tað sýnist sum um, at meginreglan hjá okkara politikarum er, at sektin á hvat annar fær, eg skal nøra at mær.

Vit upplivdu ein borgarligan fiskimálaráðharra, sum ikki fekk arbeitt fyri berum ógegni. Sig so, at teir borgarligu ikki hava fingrarnar langt niðri í landskassanum.

Áðrenn hann var frákoyrdur sum ráðharri, sendi hann í skundi út kunngerð um, at nú skuldu vit hava rullandi fiskiloyvir - til útvaldar reiðarar - í 12 ár.

Hví ikki seta í lógina, at ætlanin var, at tað skal galda í allar ævir?

Hví skula vit finna okkum í slíkari manipulatión, talan er um fólksins ogn, og ikki privata ogn hjá teimum borgarligu?

Hvat er hetta fyri politikarar, ið vit hava, og hvat verður tað næsta?

Hví so ikki eisini geva fyritøkum á landi rullandi loyvir at virka, soleiðis, at eingin annar sleppur fram at ?

Nei hettar er milt sagt at neyðtaka vinnuna og tey, ið har skulu starvast og fáa sítt livibreyð.

Tað sigst, at hetta eru heilir og hálvir bandittar, har onkrir ikki so frætt, sum kenna mun á sínum egna, og annan mans ogn.

Ja onkur visti ikki ein gang um hann átti eina flakamaskinu, men helt bara, at tað sjálvandi var so, tí at hann ynskti sær eina slíka. Um henda maskina, stóð í eini høll, sum ikki hoyrdi hesum persóni til var undirornað.

Men eftir øllum at døma er tað tó eingin forðing fyri at sita í landsins stjórn.

Var tað ì øðrum londum hevði hettar neyvan kunna lati seg gjørt.

Eitt annað sum upptekur løntakaran er, at samgongan er farin at skatta eftirlønir við inngjald

Tað sum samgongan hevur gloymt - ella ikki vil minnast - er, at tað eru fakfeløgini, sum hava uppbygt sínar eftirlønarskipanir við sáttmálasamráðingum, og hava gjørt tað út frá fortreytum, sum vit høvdu álit á, og sum ikki fóru at vera broyttar.

Hetta var jú partur av okkara løn, sum vit valdu at nýta til eftirløn.

Tí er tað ein níðingsgerð av samgonguni at koppa øllum á høvdið og stjala pening við at skatta eftirlønir við inngjald.

Annars rokni eg við, at skatting við inngjald verður sum tá kellingin gjørdi í sokkarnar, tað verður ein stokkutur varmi.

Tað ljóðaði so gott og nýhugsandi áðrenn valið frá Fólkaflokkinum, at nú skuldu øll bert rinda 40 % í skatti, hetta fyri - millum annað - at lætta um hjá illa sperdum barnafamiljum.

Var tað nú ætlanin? Veruleikin sýnist at verða ein annar.

Við flatskattinum fáa tey niðanfyri 250.000 als ongan ágóða av hesum, og eg havi hoyrt frá fólki, sum siga seg gjalda meiri í skatti nú.

Men tað, sum er mest hugstoytt er, at hesi somu fólk eru tvingaði at rinda skattalættan hjá teimun vælbjargaðu.

Vit eiga sum fakfelagsrørsla, at tala at, tá ið slíkur órættur fer fram, - eingin ivi um tað.

Men vit eiga so sanniliga eisini at taka í egnan barm og tola kritikk tá tað er uppiborðið, og tað meini eg tað er.

Vit hava fyri stuttum uppliva eitt verkfall innan almenna sektorin. Hettar vóru neyðug stig at taka fyri at krevja sín rætt.

Tó spell, at feløgini ikki megnaðu uppgávuna. Tey hoknaðu í kongunum av trýsti frá Hr. Niclassen og kompaní.

# ELI BRIMSVÍK: RØÐA 1. MAI Á VAGLINUM Í HAVN

Aftur her var tann aroganti fíggjarmálaráðharrin frammi, væl hjálptur av kompagnýnum annars, og prokklameraði, at tey alment løntu ikki høvdu sína løn uppiborna.

Soleiðis má í øllum førum niðurstøðan vera, hóast hesir somu persónar fáa meir í skattafríum ágóðum, enn ein alment settur tjenar um árið.

Tá ið tað um teir sjálvar umræður, er eingin trupulleiki at finna pengarnar. Umframt at tingfólk í samgonguni tiltuska sær stórar skattafríar upphæddir, mettast tey ikki.

Eftir at hava traðka á fakfeløgini, og tikið nógv meiri skatt inn av eftirlønum, fyri at geva teimun ríku skattalætta eru tey so ósmæðin, at tey veruliga meina at tað er rætt, at tey ikki eins og øll onnur rinda skatt av síni inntøku.

Hettar ber boð um eina korrumperaða politiska skipan, og sínir ein markleysan frekleika, og arogansu.Tað er í lagi, at politikarar fáa góða løn, tí annars fáa vit ikki góðar politikarar. Men tað er ikki í lagi, at politikarar ikki rinda skatt sum øll onnur fólk.

Tað er botn órættvíst, og stór vanærilig skomm. Men hvat hava vit so í vanti?

Helst einki gott, teir hava ikki ein gang vilja til at seta eina kanning í verk av prísstøðinum í landinum, sum øll annars undan valinum, vóru so rørandi samd um.

Sjálvt um øll framvegis eru samd um at prísstøði er alt ov høgt, og prísurin á olju, mati og øðrum neyðsinjarvørum hækka so at siga hvønn tann einasta dag, so er man ikki sinnaður at gera nakað við málið.

Helst tí, at tað var ein andstøðuflokkur, sum legði uppskotið fram.

Og til tann, ella tey, sum vilja skjóta undirritaða í skógvarnar, at renna ørindi fyri ávísan flokk skal eg bert heilsa og siga, at eg ikki eri, ella havi verðið aktivur ella tíansheldur limur í nøkrum politiskum flokki.

Haldi bert, at hendan samgongan, ella rættari sagt ósamgongan, sum nú situr við valdinum, hevur víst okkum hvat fyri vantandi virðing hon hevur fyri samfelagnum.

Haldi, at okkara vakra land, sum vit øll eru góð við, og sum hevur fostrað upp mergjaði fólk, hevur annað uppiborið, enn at verða stýrt, ella vanstýrt av slíkum samfelagsinssjakalum.

Tað er ongantíð ov skjótt, at fáa varpa samgonguna út. Vit hava ein virkisleysan løgmann, sum einans sýnist at sita har fyri lønina skyld, og letur alt um seg ganga. Ja, sjálvt hansara egnu eru frammi og rópa varskó, uttan at tað rínir við.

Tað mest ítøkiliga hann higartil hevur útint er at niðurleggja okkara sendistovu í London. Ein aðalstjóri, sum hevði brotið landsins lógir bleiv fluttur úr einum starvi til eitt annað, og var einki starv at flyta hann til, ja so uppfann man bara eitt.


aquatherm
BAXI
ROYALSCANDINAVIAN
VØLUND VARMETEKNIK
Nýtt orku-konsept frá Demich og Magn:
Allar orkuloysnir til sethús og virkir á einum staði
Les meira um nýggja orku-konseptið og Magnline oljuketilin á demich.fo/orkuhus
SALTANGARÁ
Heiðavegur 80
Tel. 200 380
TÓRSHAVN
Stiðjagøta 2
Tel. 200 300
VÁGUR
Á Marknoyri
Tel. 560 370
HITAPUMPUR
KETLAR
VENTILATIÓN
RØR OG FITTINGS
BAÐIRÚMSMØBLAR
GOSBAÐ
demich
Saltangará
Tórshavn
Vágur
HVS-VEITARIN
TIL VINNUNA
Okkara døgntænasta er at hitta á tel. 200 345
Tí velja handverkarar Demich
Vit veita bestu ráðgevingina
Vit eru landsdekkandi
Vit umboða dygdarvørur
Vit hava kappingarførar prísir
Vit hava góða kundatænastu
Vit hava døgntænastu
Vit hava framkomnar blikksmiðjur
Á smiðjuni í Havn kunnu vit tilevna inndekningar upp til 3 m
demich
Hiti • Ventilatión • Sanitet
Okkara dygd – tín trygd!
www.demich.fo

Vegurin Langi · Postboks 3309
FO-110 Tórshavn · tel 345 000
fax 345 001 · www.balslev.fo
balslev@balslev.fo




BYGMA
BALSLEV







ARTICON

Articon P/f · á Hjalla 20 · 188 Hoyvík · Tel. 350 700 · www.articon.fo

# SPEKT kann hjálpa tær við

Bókhaldinum
Roknskapinum
Lønarumsitingini
Sjálvuppgávuni
Kapitalvinnings-sjálvuppgávuni
Rentustuðlinum
Útlendskum skatti
Afturrindan av mvg
Eftirlønum

SPEKT løggildir grannskoðarar Spf. · Staravegur 17
Postsmoga 3258 · 110 Tórshavn · Tel 34 34 34
Faks 34 34 35 · spekt@spekt.fo · www.spekt.fo

SPEKT | løggildir grannskoðarar



# SKAPANDI ÚTBÚGVINGAR

www.tst.fo
skapandi umhvørvi

## Tekniski Skúlin

.... ein virkin og góður samstarvsfelagi

Ein skúli, ið gevur góða og samanhangandi undirvising, í tøttum samstarvi við vinnu og lærling

- vit seta lærlingin í miðdepilin
- vit nøkta tørvin hjá vinnuni
- vit hava høgan námsfrøðiligan og fakligan førleika



Bil
Maskin
Smiðja
El
Timbur
Stil@Snið

Tekniski Skúlin, Postrúm 3239, 110 Tórshavn, tlf. 738050, t-postur tst@skulin.fo, www.tst.fo

Vóru tað Palliba ella Marsanna, ið komu soleiðis fyri, fingu tey fótin í eitt vist stað.

Var tað nakar sum segði, at stættarstríðið var av?

Hettar byggir ikki land, harra løgmaður. Men vit vita jú øll hvør stýrir her á landi, er hann nevndur, er hann kendur.

Tað seinasta skotið í røðini var at seta ALS gjaldið niður, og pensionsaldurin upp.

Er hettar ikki ein máti at halda teimun ungu útbúnu vekk, og ein roynd at tøma ALS.

Kann tað hugsast, at ætlanin er at innflyta bíliga arbeiðsmegi í staðin.

Ein freistast í øllum førum til at hugsa so.

Fyri stuttum stóð á prenti, hvat hesir gribbarnir høvdu klára at til-tuska sær í pensjónum frá tí almenna. Hettar eru politikkarar, sum aldursmessiga illa nokk eru turrir aftan fyri oyra. Ein má øtast.

Ein av miðlunum hevði mynd av fíggjarmálaráðharranum standandi undir einum træi saman við yvirskriftini: Neyðugt at hækka pensjónsaldurin.

Viðmerkingarnar vóru nakrar og tredivu, og vóru allar neiligar. Legði serliga merki til tað einu viðmerkingina sum var, eg siteri:

Hygga Jørgin, ein flott mynd við trøum í bakgrundini, men hvar eru hinar apurnar?

Hettar er tíverri holdningurin hjá vanliga fólkinum um okkara landsstýri, og haldi eg at tað sigur alt.

Føroya Fiskimannafelag skrivar á heimasíðu síni, at vit eru við at fáa anarkistiskar tilstandir viðvíkjandi bíligari, og ólógligari útlendskari arbeiðsmegi. Hesum kann eg bert taka undir við.

Havi sjálvur vegna okkara fakfelag átala hettar fyri okkara myndugleikum, og enntá melda málið til løgregluna, uttan at nakar letst um vón. Ein freistast til at halda, at onkur hevur persónlig áhugamál í hesum, og tí er lok lagt á. Nú má nokk vera nokk. Her má annað skil koma á.

Eg haldi, at tíðin er komin til, at fakfelagsrørslan tekur í egnan barm, og setur seg saman, við tí fyri eyga, at stovnseta eitt føroyskt LO.

Eitt LO, sum hevur greiðan arbeiðssetning. Ásetingar um, hvat tað skal taka sær av, og hvat tað møguliga ikki skal taka sær av.

Avbjóðingin verður at finna rætta valdsbýtið, soleiðis, at øll feløgini hava sítt skjaldarmerki við í einum slíkum felagsskapi. Tíðin hevur víst okkum, at hettar er tvingandi neyðugt.

Hví? Tí at teir, sum nú ráa fyri borgum sýnast at hava eittans endamál, og tað er at niðurbróta fakfelagsrørsluna, trekkja tenninar út, stig fyri stig.

Hettar muga vit ikki lata teir fáa loyvi til. Nei, lati okkum vísa teimun, at vit standa saman, og at vit ikki góðtaka hvat sum helst.

Vit eiga at krevja, at øll eru líka fyri landsins lógum, eisini politikarar. Teir eiga ikki at fáa einar 15 ferðir so nógv í koyrifrádrátti sum Palliba og Marsanna,og heldur ikki eiga teir, at fáa eftirløn uttan so, at teir sjálvir/sjálvi rinda inn fyri hana sum øll onnur her í samfelagnum.

Hvat líkist tað, at einans 16 ár á tingi, geva fulla tænastumannapensjón, meðan øll onnur skula arbeiða útvið 40 ár fyri at uppnáða fult útgjald?

Tað er líka við, at skattafríir ágóðar sokallað borðfæ og koyripeningur, eru størri enn vanliga lønin, soleiðis at lønin nú er eitt ískoytið. Alt hettar eru teir borgarligu garantar fyri.

Samstundis tosar man í ramasta álvara um at fáa ungar væl útbúnar føroyingar heimaftur eftir lestur.

Hvat skula tey koma aftur til?

Kom fyri stuttum at tosa við ein ungan væl útbúnan føroyskan lækna, sum starvast uttanlands.

Spurdi um hann ætlaði at koma heim aftur at starvast. Svari var, at tað var tað hann best kundi hugsa sær men, at tað ikki var ein møguleiki, so leingi hettar politiska sirkusið við vina og kenninga politikki heldur áfram, og hann helt fram, at hesa áskoðan hevur ein stórur partur av teimum ungu undir útbúgving.

Hettar má sigast at vera greið tala, og er helst ein av stóru orsøkunum til at fólkatalið minkar.

Nei vilja vit landinum væl eiga vit at geva hesum vargunum durafjórðingin til komandi val, og lata teir vera í andstøðu í fleiri valskeið fram.

Føroyar hava brúk fyri nýggjum politikki, og tí eiga teir flokkar, ið nú sita í andstøðu at fáa møguleikan fyri at vísa hvat dugur er í teimun.

Tað er einki at ivast í, at teir eru førir fyri at fáa skútuna Føroyar á rættkjøl aftur.

Alternativið kenna vit, og tað er ræðandi og oyðileggjandi fyri samfelagið.

At enda fari eg, at takka Havnar Arbeiðsmannafelag fyri, at teir á hvørjum ári so trúliga átaka sær at skipa fyri 1. mai dags haldi í høvuðstaðnum.

Eli Brimsvík er formaður í Havnar Handverkarafelag

www.torshavn.fo



Skapandi, mennandi, kveikjandi

TÓRSHAVNAR KOMMUNA





Glarmeistarin v/Poul Guttesen.
Søla og montering av
lágorkutermorútum ,
u-virði niður í 0,4 .
Einkultglas, spegl, herða glas
til brúsu–og glasveggir.
www.glarmeistarin.fo
Alt Glarmeistaraarbeiði verður gjørt. 219466-229466




elmek
v/Magnus Magnussen · Gripsvegur 18 · FO-100 Tórshavn
tel 317352 · far 217700 · elmek@post.olivant.fo
Alt el- og edvarbeiði verður gjørt skjótt og væl




mazda
Tann nýggi 6 'arin er komin
ZOOM-ZOOM
mazda 6
Bilasølan
www.mazda.fo




**Betri pensjón tryggjar tær eina munagóða samansparing, sum leggur lunnar undir eina framhaldandi vælferð, tá ið tú fert frá fyri aldur.**

- Vit samanseta pensjón og tryggingar eftir tínum tørvi
- Vit umsita tína pensjón við størsta vinningi fyri eyga
- Umvegis Netpensjón hevur tú fult gjøgnumskygni



**Savnar tú tryggingar og pensjón hjá okkum, kanst tú fáa upp til 32% í avsláttri.**

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR

Betri pensjón